# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

**Evni:** Um veiðirættindi og friðingar

**Spurningar:**

1. Hvussu leingi hevur eystari kantur av Føroyabanka verið friðaður?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at geva trolarum, sum royna eftir svartkalva, betri trolleiðir á djúpari leiðunum á eystara kanti av Føroyabanka?
3. Hevur landsstýrismaðurin í hyggju at geva svartkalvabátunum betri veiðirættindi og møguleikar?

**Viðmerkingar:**

Trolarar, sum royna eftir svartkalva á djúpum vatni (270 favnar og djúpari), sleppa ikki at fiska á eystara kanti av Føroyabanka. Orsøkin er friðingin av toski og hýsu. Friðingin ger, at økið hjá svartkalvabátunum gerst so avmarkað. Botnurin uttanfyri er sera ringur, og tí er ongin fiskiskapur eftir svartkalva á fleiri leiðum longri suðuri. Djúpvatnstrolarar fiska á 270 favna dýpi og djúpari, har hvørki toskur ella hýsa eru at fáa. Fyri at fáa greiðu á ætlanunum hesum viðvíkjandi, verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 3. august 2021**

Jóhannis Joensen